Vikuskiftis Sosialurin

Nr. 165 - 29. august 2008

## Pólstríðið harðnar

Okkurt bendir á., at kappingin ella stríðið um at fáa ræðisrætt yvir økinum kring Norðpólin harðnar í hvørjum. Í gjár sendi kanadiski forsætisráðharrin, Stephen Harper, Danmark, Noregi, Russlandi og USA boð um, at øll skip, sum sigla farleiðina norðan fyri kanadisku strondina, skulu siga kanadisku sjóverjuni frá, so hon kann skráseta tey. Ta seinastu tíðina er ísurin í póløkinum minkaður munandi, og fleiri skip hava valt at velja ta leiðina millum Atlantshavið og Kyrrahavið. Umframt siglingarleiðina hava londini í økinum stóran áhuga fyri møguligum ráevnum undir havbotninum í økinum.



## Nógv virksemi í Skálavík

Planeringin av frítíðardeplinum í Skálavík sær út til at verða komin væl áleiðis (myndin). Arbeiðið gongur sína gongd. Lastbilar koyra til og frá økinum allan dagin við gróti. Tað er Sp/f Finnleif Fagradal, ið ger planeringina klára til depilin. Eiler Jacobsen fíggjar byggingina. Ætlanin er, at planeringin skal verða liðug um mánaðarskiftið oktober/november, og hetta sær út til at halda, skrivar heimasíðan bkv.fo. Arbeiðið við at gera havnina aftur í Skálavík, er eisini farið í gongd nú. So tað er rættilig gongd í Skálavík fyri tíðina.

# Danskir konflikt-meklarir í Føroyum

**Í hesum døgum eru tveir danskir konfliktmeklarir, Henrik Rosager og Bjarne Vestergaard úr Center for Konfliktløsning í Fredriksberg, í Føroyum. Teir eru bidnir at koma higar at undirvísa í konfliktloysing, men teir eru eisini útbúnir at virka sum beinleiðis meklarir**

KONFLIKTMEKLING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Hóast tað ikki er eitt nýtt fyribrigdi í Evropa, er tað enn næstan óhoyrt í Føroyum. Talan er nevnliga um konfliktloysarar, ið undirvísa í konfliktloysing og lata arbeiðspláss, stovnar og skúlar í til at taka sær av at loysa konfliktir.

Henrik Rosager og Bjarne Vestergaard, sum báðir eru útlærdir undirvísarir í konfliktloysing og virknir semingsmenn, fingu ein fyrispurning frá eini føroyskari fyritøku, ið var áhugað í at hoyra meira um konfliktloysing, og teir valdu so at takka ja og koma til Føroya.

### Geva fólki eitt amboð

Tað, ið flest allir føroyingar seta í samband við meklarar, er at teir eru ein óheftur triðji partur, ið verður kallaður inn at finna semju millum tveir stríðandi partar tá verkfall ella verkbann er. Men konfliktloysararnir virka eisini á øðrum stigum, enn tá opið stríð er millum partar.

Teir bjóða seg eisini fram at koma út á privat arbeiðspláss, almenn arbeiðspláss, almennar stovnar og skúlar, har teir undirvísa í konfliktmekling.

Endamálið við at undirvísa í konfliktmekling er at lata arbeiðspláss, stovnar og skúlar í til sjálvi at betri kunna síggja og loysa konfliktir, umframt at teir eisini geva teimum eitt amboð til at fyribyrgja konfliktum.

- Í høvuðsheitum er uppgávan hjá okkum ikki beinleiðis at loysa konfliktir, men heldur at lata fólk í at kunna loysa trupulleikar sjálvi, tá teir stinga seg upp, sigur Bjarne Vestergaard.

Ofta er tað soleiðs á arbeiðsplássum, har ferðin er høg, at so dettur samskiftið ofta niðurímillum og verður vánaligt. Tá stinga ósemjur á fleiri stigum seg upp, bæði smærri og størri ósemjur, sum kunnu órógva arbeiðsumhvørvið.

- Tá kunnu vit koma út á arbeiðsplássið, og geva teimum eitt amboð at loysa konfliktirnar við. Arbeiðspláss skulu lærast upp, tey skulu undirvísast í at loysa trupulleikar, helst áðrenn teir veruliga breiðkast. Til at eitt arbeiðspláss ella ein stovnur skal kunna loysa trupulleikarnar gott og væl innanhýsis, kunnu vit læra tey upp og geva teimum eitt konfliktkodeks, sum er ein demokratiskt viðtikin uppskrift til at loysa ein trupulleika, um hann stingur seg uppaftur. Hetta er til at forða fyri at arbeiðsplássið steðgar upp, greiðir Henrik Rosager frá.

### Byrja við teimum yngstu

Bjarne Vestergaard og Henrik Rosager hava arbeitt sera nógv við skúlum og barnagørðum. Tá arbeiða teir við konfliktmekling á fleiri ymiskum stigum. Í skúlum er happing og stríð millum børnini ein væl kendur trupulleiki. Kring alt Evropa nýta tey konfliktmekling í barnagørðum og í fólkaskúlum.

- Lykilin er at pedagogar, lærarar og vaksin skulu duga tað. Tá vit koma út á ein stovn ella ein skúla, geva vit eitt skeið í konfliktmekling fyri øllum starvsfólkunum. Afturat tí, so geva vit eitt intensivt kursus í konfliktmekling, soleiðs at vit skapa fýra ella fimm meklarar millum arbeiðsfólkini. Síðani skulu tey læra næmingarnar, og útbúgva fýra ella fimm meklarar. Men tað verður stórur dentur lagdur á, at tá næmingar og børn eru meklarar, at tey altíð mekla millum yngri børn, og ikki javngomul, leggur Bjarne Vestergaard dent á.

Endamálið við hesum er, at børnini kunnu taka hetta við sær víðari í lívinum og gerast betri før fyri at fáa eyga á og loysa konfliktir, ið stinga seg upp.

Afturat hesum hava teir eisini arbeitt nógv við vaksnum fólkum, sum arbeiða á gøtunum, og í Danmark hava kommunurnar serlig meklaralið. Hesi virka fyri at forða fyri at ungdómar koma út í kriminalitet og annað óføri. Millum annað hevur danska løgreglan tað sum ein kravdan part av eftirútbúgvingini, at løgreglufólkini skulu gjøgnum eitt konfliktloysaraskeið.

### Skapa sunt arbeiðsumhvørvi

Tá teir arbeiða við arbeiðsplássum, tað verði seg almenn ella privat, hava teir eina fasta mannagongd, tá talan er um at geva arbeiðsplássinum eitt amboð til at loysa konfliktir innanhýsis.

Fyrst av øllum skulu øll starvsfólkini á arbeiðsplássinum kunnast og undirvísast samstundis. Um tað skal eydnast, má ovasta leiðslan á arbeiðsplássinum lærast og taka hetta til sín. Afturat tí má fólkið »á gólvinum« eisini lærast upp og taka tað til sín. Ikki fyrr enn tá kann tað eydnast.

- Endamálið við hesum er at skapa eitt sunt arbeiðsumhvørvi. Tað er ofta tí at fyritøkur ringja til okkum, fyri at biðja okkum koma út til tær og hyggja eftir, hvussu tað stendur til, og eisini fyri at undirvísa teimum, soleiðs at tey sjálvi kunnu viðlíkahalda eitt gott arbeiðsumhvørvi. Eitt keðiligt arbeiðsumhvørvi er streingjandi fyri arbeiðsfólkið, og ofta skapar hetta nógva sjúkrafráveru, sum eisini er dýrt fyri arbeiðsplássið. Tí velja fleiri fyritøkur at ringja til okkum og taka av hesum tilboðnum, soleiðs at tey fáa eitt gott arbeiðsumhvørvi og samstundis fáa eitt høgt virkisføri, vísir Bjarne Vestergaard á.



*Bjarne Vestergaard*

### Spentir at vita hvussu er í Føroyum

Henda ferðin til Føroya hjá Henrik Rosager og Bjarne Vestergaard er tann fyrsta hjá teimum báðum. Teir vita heldur ikki um nakrar konfliktmeklarar, sum hava verið her áður, og teir eru tískil sera spentir at vita hvussu støðan er hesum viðvíkjandi í Føroyum.

- Føroyar eru sera spennandi á hesum økinum við tað, at samfelagið er so lítið. Vit hava verið her í sera stutta tíð enn, men fleiri ferðir hava vit hoyrt tað, at føroyingar kenna hvønn annan sera væl, og at øll vita hvørji øll eru, hóast tað ikki er júst so. Men í stóran mun vita føroyingar rættiliga væl um hvønn annan, og vit eru tí sera spentir at vita hvussu hetta ávirkar mátan, føroyingar taka sær av konfliktum. Men havandi í huga tær royndir, sum hava bæði úr Danmark og øðrum evropeiskum londum, so vænti eg ikki at tað er so nógv øðrvísi. Eg eri av teirri hugsjón, at tá tað kemur til stykkis, so eru øll menniskju bara menniskju. Tú verður bara noyddur at finna inn til kjarnuna í konfliktini, og tá eru menniskju sera lík, óansæð hvar tú er, leggur Henrik Rosager doyðin á.

Enn er ov tíðliga hjá teimum báðum, Henrik Rosager og Bjarne Vestergaard, at koma við nøkrum niðurstøðum, men teir vóna at fáa betri innlit í hetta hesar dagarnar, teir eru í Føroyum.



*Henrik Rosager*